**Sonja Jógvansdóttir**
**løgtingsmaður**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 9/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit**
(Løgfrøðiligt kynsskifti)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit** (Løgfrøðiligt kynsskifti)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit, sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2011 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3 verður aftan á stk. 5 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin í innlendismálum letur eftir skrivliga umsókn nýtt persónsnummar til persón, ið kennir seg vera av hinum kyninum. Nýtt persónsnummar er treytað av, at viðkomandi skrivliga boðar frá, at ynskið um nýtt persónsnummar er grundað á eina kenslu av at hoyra til hitt kynið, og at viðkomandi eftir umhugsanartíð í 6 mánaðir frá umsóknardegnum skrivliga váttar sína umsókn. Somuleiðis er tað ein treyt, at viðkomandi er fylt/ur 18 ár, tá søkt verður."

Stk. 6 verður eftir hetta stk. 7.

**2.** Í § 23, stk. 4 verður "stk. 6" broytt til: "stk. 7".

**§ 2**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.

## Almennar viðmerkingar

Hetta uppskot heimilar at fólk, hvørs lívfrøðiliga kyn er í andsøgn við kynssamleika teirra, umvegis eina umsókn kunnu skifta kyn løgfrøðiliga. At skifta kyn løgfrøðiliga merkir, at tú søkir um at fáa eitt p-tal, sum samsvarar við tín kynsliga samleika, og hetta gevur tvørkyndum møguleika at velja sær navn samsvarandi samleika sínum, fáa nýtt samleikaprógv, koyrikort og pass.

Mannagongdin fyri at skifta kyn løgfrøðiliga verður, at umsókn um at skifta p-tal skal latast avvarðandi myndugleika. 6 mánaðir eftir at umsóknin er latin, skal tann tvørkyndi vátta fyri myndugleikanum, at ynski framvegis er um eitt nýtt p-tal, og viðkomandi fær so nýtt p-tal samsvarandi kynssamleika sínum.

51 lond um allan heim heimila, at fólk kunnu skifta kyn, men ymiskt er, hvørjar treytir verða settar. Í nøkrum londum er ásett, at fólk skulu til sálarfrøðiliga útgreining, og møguliga undir aðra og

meira víðfevnda viðgerð. Summi lond krevja skurðviðgerðir, og at tey, sum skulu skifta kyn, gerast lívssør. (Hetta er núverandi støða í Føroyum). Í øðrum londum er ásett, at fólk sjálvi hava sannkenning við sín kynsliga samleika, og kunnu skrásetast í fólkayvirlitum samsvarandi (t.d. Danmark, Noreg, Írland og Malta). Fleiri lond hava valt henda leist seinastu árini, og væntast kann at hetta økist, tí tað at vera tvørkyndur er tikið av listanum yvir sálarligar sjúkur her hjá okkum og í heimsheilsustovninum WHO.

Fyri tvørkynd er ógvuliga ymiskt, hvørji ynski eru í mun til kynsliga samleikan. Summi ynskja hormonviðgerð, onnur eisini at fara undir skurðviðgerðir meðan uppaftur onnur einans ynskja møguleikan at broyta kyn og navn samsvarandi kynsliga samleika sínum. Felags fyri allar bólkar er, at tað hevur stóran týdning, at tey kunnu verða alment skrásett samsvarandi sínum samleika, og viðurkend av samfelagnum sum hesi.

At geva tvørkyndum persónum møguleika fyri løgfrøðiligum kynsskifti gevur teimum møguleika í sínum gerandislívi og -virki at liva í samsvari við tað tey eru, og er ein almenn viðurkenning. Henda lítla lógarbroyting fer at gera ein ógvuliga stóran mun hjá føroyskum tvørkyndum og avvarðandi teirra.

**Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið | Fyri kommunur | Fyri ávís øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Altjóða sáttmálar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |

## Serligar viðmerkingar

### Til § 1

Til nr. 1. Nýtt stykki verður sett inn. Heimilað verður persóni at skifta kyn, løgfrøðiliga, um viðkomandi hevur kenslu av at hoyra til hitt kynið, treytað av, at viðkomandi er fylt/ur 18 ár og hevur váttað sína umsókn eftir eina umhugsanartíð á 6 mánaðir frá umsóknardegnum.

Til nr. 2. Teknisk broyting í sambandi við broyting í nr. 1.

### Til § 2

Gildiskomuáseting. Lógin kemur í gildi tann 1. januar 2019.

**Á Løgtingi, 21. august 2018**

Sonja Jógvansdóttir